www.torshavn.fo

# Vinnustykki á Skarðshjalla




**NÚ HEVUR TÚ MØGULEIKAN AT OGNA TÆR BYGGIBÚGVIÐ VINNUGRUNDSTYKKI Á SKARÐSHJALLA**

Sum framhald av útstykkingini á Sandvíkarhjalla, útstykkjar kommunan umleið 24.000 fermetrar til vinnugrundstykki á Skarðshjalla.

Grundstykkini eru ætlað til framleiðsluvinnu, byggivinnu, bilasølu, verkstaðir og líknandi vinnur, sum eru umhvørvisflokkaðar í flokki 3 til 6.

**STØDD Á GRUNDSTYKKJUM**
Støddin á grundstykkjum verður millum 1.100 og 3.100 fermetrar.

Um áhugi er fyri smærri grundstykkjum ber til at býta stykki sundir í smærri eindir eftir nærri avtalu.

Grundstykkini verða grivin út og grovplanerað, og fjarhiti, vatn, kloakk og el verður lagt inn á hvørt stykki.

**KOSTNAÐUR**
Mettur fermeturprísur er kr. 1.200,00.

Helvtin av metta kostnaðinum fellur til gjaldingar við undirritan av fyribilsskeyti, og restin fellur til gjaldingar, tá ið økið er liðugt byggibúgvið og grundstykkini eru matrikulerað.

**TÍÐARÆTLAN**
Fyrstu stykkini verða ætlandi byggibúgvin seinni í ár.

**FLEIRI UPPLÝSINGAR**
Um tit vilja ogna tykkum eitt stykki, ella um tit hava spurningar í hesum sambandi, kunnu tit venda tykkum til løgdeildina á telefon 302010, ella senda okkum teldubræv á torshavn@torshavn.fo.

Til ber at lesa meira um útstykkingina og um umhvørvisflokking av vinnuni á heimasíðuni hjá kommununi www.torshavn.fo.




TÓRSHAVNAR KOMMUNA